Vir›isbrævamarkna›urin á veg: Stovna felag um stutta tí›

Fyrireikingarnar til at seta á stovn vir›isbrævamarkna› í Føroyum eru nú komnar so langt álei›is at felag ver›ur stovna› til endamáli› á›renn langt umlí›ur. Kortini kann ta› ganga eitt gott hálvt ár, á›renn markna›urin letur dyrnar upp

SVEINUR TRÓNDARSON

Um stutta tí› ver›ur felagi›, sum skal reka føroyska vir›isbrævamarkna›in, sett á stovn.

Líka sí›ani landsst‡ri› á fundi samtykti at seta á stovn vir›isbrævamarkna› í Føroyum hevur ein fyrireikingarbólkur arbeitt vi› málinum, og nú er hann vi› at koma á mál.

Í stuttari vi›merking, sigur Jonhard Eliassen at partarnir, sum sita í fyrireikingarbólkinum, sum heild eru samdir um at seta á stovn eitt felag, sum skal taka sær av rakstrinum, um enn alt ikki er falli› endaliga upp á pláss enn, sigur hann.

Men hóast felagi› helst ver›ur sett á stovn um stutta tí›, so kemur ikki gongd á markna›in enn. Hesum mugu vit bí›a eftir, sigur Jonhard Eliassen. Orsøkin er tann, at felagi› skal ígjøgnum eina drúgva gó›kenningarproseduru, sum kann taka heilt upp í eitt ár.

- Eftir at felagi› er stovna›, skal nevndin í holt vi› at gera felagi› til. Har skulu gerast mannagongdir, edvskipanir skulu keypast, trygdarskipanir skulu gerast og manualar skulu skrivast. Men ikki nóg miki› vi› tí. Hetta skal alt gó›kennast eisini, og ta› skal Fíggjareftirliti›, sum skal geva hesa gó›kenning, sigur Jonhard Eliassen.

Skal Fíggjareftirliti› gera alt gó›kenningararbei›i› uttan at kenna til tilfari›, so kann ta› taka drúgva tí›. Hinvegin ber til hjá nevndini at fara út á markna›in at keypa sær mannagongdir, trygdarskipanir og reglur, sum Fíggjareftirliti› longu einafer› hava gó›kent, og tá tekur ta› ikki so langa tí›, grei›ir Jonhard frá.

Og fordømi finst. Í Danmark er ein annar løggildur markna›ur, sum virkar á sama hátt, sum ætlanin er at gera í Føroyum, og tí er ikki óhugsandi, at hann kemur at vera leisturin undir føroyska markna›inum.

Hesi tí›indi vil Jonhard Eliassen hvørki vátta› ella avsanna›, tí ta› ver›ur upp til nevndina í felagnum at taka stø›u til.

Tá tann føroyski vir›isbrævamarkna›urin fer at virka, ver›ur talan um ein løggildan markna›. Hetta er ein av tveimum mátum at gera vir›isbrævamarkna› uppá, og hesin er tann, sum krevur minstu byrjunaríløguna.

- Partapeningurin skal ver›a átta milliónir krónur, og ta› er ein upphædd, sum skal standa órørd, sigur Jonhard Eliassen.

Skuldi ein børsur veri› settur á stovn, var kravi› 40 mió. krónur, og ta›, saman vi› ø›rum, er mett at vera í yvirkant av tørvinum her heima. Krøvini og treytirnar eru nógv strangari og tí ver›ur lagt upp til at føroyingar seta á stovn løggildan markna›, sum er munandi lættari at handfara.

Trygdirnar skulu kortini ver›a tær somu, og ta› er framvegis Fíggjareftirliti›, sum hevur eftirliti› vi›, at alt fer rætt fram á markna›inum.

Spurdur um nær markna›urin fer at virka, sigur Jonhard, at ta› vil hann ikki siga naka› um.

- Ta› er torført at meta, og ta› hongur nógv saman vi› hvønn framfer›arhátt nevndin velur, tá hon fer ígongd. Hinvegin kunnu vit vísa á, at tá danski markna›urin fór í gongd, tók gó›kenningin eitt ár, sigur Jonhard Eliassen at enda.

Stórir møguleikar fyri framman

- Skal vir›isbrævamarkna›urin hava nakran møguleika yvirhøvur, so er ney›ugt, at vinnan lagar seg til n‡ggju avbjó›ingina og n‡ggju møguleikarnar, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í TK-Stovuni, í sambandi vi› at føroyski vir›isbrævamarkna›urin nú er á trappuni

SVEINUR TRÓNDARSON

Arbei›i› hjá landsbankanum vi› vir›isbrævamarkna›inum er nú komi› so langt álei›is, at útlit eru fyri, at markna›urin er veruleiki um eitt hálvt ár ella so.

Í hesum sambandi bjó›a›i TK-Stovan til seminar í gjár, og ta› var júst vir›isbrævamarkna›urin, sum var til vi›gerar. Vit fingu or› á stjóran í TK-Stovuni, Ólav Gregersen, og spurdu hann um hvat hann sær í einum føroyskum vir›isbrævamarkna›i.

Avbjó›ing og møguleiki

- Ein føroyskur vir›isbrævamarkna›ur gevur nógvar n‡ggjar avbjó›ingar, samstundis sum hann eisini gevur vinnuni n‡ggjar møguleikar. Ta› var ta›, sum vit vildu grei›a vinnuni frá, og tí valdu vit at gera eitt seminar vi› seks ymsum fyrilestrum um evni, sigur Ólavur Gregersen.

Stjórin á TK-Stovuni grei›ir frá, at fyri føroyska vinnu er ta› ein kollvelting, at møguleiki er at skráseta fyritøkur í keypsskálum, sum gjørt ver›ur uttanlands, tí vanliga eru ta› familjur, sum eiga fyritøkurnar ella eru ta› vinir og kenningar, sum eiga tær. Ta› er meira sjáldsamt, at nógvir — sínamillum ókendir — eigarar eru uppi í eigaraskaranum.

Men vi› vir›isbrævamarkna›inum beint fyri stavn, ver›ur hetta ein møguleiki, og ta› er m. a. her, at kollveltingin liggur.

- Ta› skulu henda nógvar og stórar broytingar í føroyskum fyritøkum, skulu tær skrásetast á einum vir›isbrævamarkna›i. Hetta fer at hava nógvar praktiskar broytingar vi› sær, so sum krøv til opinleika, tá ta› um roknskapin ræ›ur. Ta› fer nevniliga at hava vi› sær, at virkini í framtí›ini ikki bara skulu selja vørur sínar, men eisini virki›. Yvirskoti› kemur at hava beinlei›is ávirkan á vir›i, sum so aftur fær ávirkan á fíggingarmøguleikarnar, sigur Ólavur Gregersen.

Og ta› er júst her, tann stóri møguleikin hjá føroyskum virkjum liggur.

Bankarnir avgerandi leiklut

Seinastu árini hava vit hoyrt nógv tosa› um, at føroysku peningastovnarnir eru vornir meira afturhaldnir tá ta› um fígging ræ›ur. Peningastovnarnir eru ikki samdir í hesi útsøgn, tí ha›ani ver›ur sagt, at teir fíggja ta›, sum er rá›iligt at fíggja.

Vi› vir›isbrævamarkna›inum kemur so ein møguleiki afturat peningastovnunum og framtaksgrunninum, men eisini hetta fer at seta stór krøv til opinleikan og tilvitanina um markna›in, heldur Ólavur.

- Ta› er einki at taka seg aftur í, at vir›isbrævamarkna›urin vi› tí›ini, fer at geva føroyskum fyritøkum ein eyka fíggingarmøguleikan, men ta› fylgir so nógv vi› hesum møguleika, sum fyritøkurnar eiga at vera fyrireika›ar uppá, sigur hann.

Vi› at hyggja í roknskapirnar hjá peningastovnunum so sæst, at nógvur peningur stendur sum bundin uppsparing, og ta› er einum parti av hesum peninginum, sum fyritøkurnar skulu hava fatur í, tá tær fara á vir›isbrævamarkna›in.

Men ta› ver›ur ikki so, at hvør ma›ur gla›beintur loypir á dyr, tá hann hoyrir, at partabrøv eru til sølu í eini fyritøku, sigur Ólavur og leggur afturat, at tá ver›ur ta› upp til virkini og lei›slur teirra, at gera júst teirra fyritøku til eitt lokkandi og áhugavert tilbo›, sum kundarnir ikki kunnu lata vera vi› at keypa partabrøv í.

- Og so skulu ætlanirnar og metingarnar sjálvandi halda, sigur hann.

Hugbur›sbroyting

Men alt hetta vi› vir›isbrævamarkna›i fer at krevja eina stóra hugbur›sbroyting í øllum samfelagnum heldur stjórin í TK-stovuni. Føroysk vinna og samfelagi› sum heild er ikki vant til at hugsa á henda hátt, og fyri at seta gli› á, er ney›ugt, at skipa› ver›ur fyri ymsum kunnandi tiltøkum.

Í gjár skipa›i TK-Stovan fyri seminari um føroyskan vir›isbrævamarkna›, og frammanundan hava peningastovnarnir skipa› fyri onkrum tiltøkum um sama evni.

- Vinnan skal umstilla seg til ø›rvísi møguleikar og umstø›ur, men ta› er avgjørt ikki naka›, sum kemur av sær sjálvum, og slett ikki naka›, sum kemur eftir stuttari tí›, sigur stjórin í TK-stovuni.

Í Íslandi tók ta› fleiri ár, at fáa fer› á teirra vir›isbrævamarkna›, men samstundis fóru íslendingar at handla vi› vir›isbrøvum uttanfyri Ísland. Nøkunlunda sama gongd kann væntast í Føroyum, heldur Ólavur og vísir á, at ta› í veruleikanum longu er byrja›, nú Kaupthing og peningastovnarnir eru farnir til verka.

Ólavur Gregersen heldur, at ta› kann taka naka› av tí›, á›renn føroysku fyritøkurnar rættuliga eru komnar út á markna›in

Mynd: Jonhard Hammer

Fyri føroysku fyritøkurnar kann ta› kortini fara at taka longri tí›, at sleppa út á markna›in, og í tí tí›arbilinum skulu fyritøkurnar leggja á annan bógv, vísir stjórin á.

- Í framtí›ini ver›a fyritøkurnar ikki bara máldar eftir gó›skuni av vøruni, men ta› vera máldar alla tí›ina, sigur Ólavur Gregersen.

a

Letur upp fyri stórum møguleikum

Stjorin í Kaupthing, Petur Holm, er sannførdur um, at ein vir›isbrævamarkna›ur hev›i givi› stórar møguleikar til føroyskt vinnulív. Hinvegin vísir hann eisini á, at hetta fer at seta n‡ggj krøv til fyritøkurnar

JÁKUP MØRK

Stjórin í Kaupthing Føroyar, Petur Holm, sær stórar møguleikar í einum møguligum komandi føroyskum vir›isbrævamarkna›i.

- Hetta fer at geva føroysku virkjunum a›rar og størri møguleikar, tá peningur skal savnast til eina n‡ggja verkætlan, men samstundis fer hetta eisini at seta heilt onnur krøv til virkislei›slurnar runt um í landinum.

Stórir møguleikar

Fyri at taka møguleikarnar fyrst, so vísir Petur á, at virkini í dag so at siga bert hava ein møguleika, tá farast skal undir n‡tt virksemi, ella um talan er um n‡ggjar verkætlanir.

Peningur kann lænast frá peningastovnunum, og hesum skal sum kunnugt latast renta av. Møguleiki er sjálvandi eisini fyri at peningur ver›ur skotin í virksemi›, men í flestu førum er tá talan um nakrar fáar einstaklingar, sum á einhvønn hátt hava tilkn‡ti til virki.

Vi› einum vir›isbrævamarkna›i lata heilt n‡ggir møguleikar seg upp, tí møguligu íleggjararnir gerast tá nógv fleiri í tali, og peninganøgdin, sum kann setast í ætlanirnar, ver›ur tá eisini samsvarandi størri.

Eisini ver›ur hetta ein møguleiki hjá fleiri einstaklingum, at relisera ein part av vir›um sínum, um hugur er til tess, umframt at størri møguleikar ver›a fyri, at virki skifta hendur.

Vi›víkjandi hesum seinasta vísir Petur millum anna› á dømi, har ein fyritøka hevur veri› ein familjuogn í langa tí›, kanska gjøgnum fleiri ættarli›. Um so eingin er at taka yvir, tá verandi stjórin ætlar sær at gevast, fella hesar fyritøkar ofta ni›urfyri, ella ver›ur onkur í familjuni møguliga noyddur at fara í eitt starv, sum vi›komandi í veruleikanum ikki ynskir.

Vi› n‡ggja markna›inum er tá ísta›in møguleiki at selja ø›rum fyritøkuna til markna›in, ísta›in fyri sjálvur at skula leita sær eftir keypara. Er talan um eina sunna fyritøku, skulu keypararnir nokk koma av sær sjálvum, vísir Petur Holm á.

Hugbur›sbroyting

Skulu virkini fáa gle›i av hesum møguleika er tó í nógvum førum ney›ugt vi› eini hugbur›sbroyting hjá virkislei›slunum í landinum.

- Ta› kann t.d. vera torført hjá lei›sluni í eini fyritøku at ásanna, at ta› kann vera ein fyrimunur at fáa fleiri partaeigarar, tá virki› í kanska langa tí› hevur veri› ogn hjá einum og sama persóni. Ilt kann tá vera at gó›taka, at ein partur av avger›arrættinum ver›ur fluttur av egnum hondum, men uttan at generalisera øll virki, kann hetta í ávísum førum virka til at skapa eitt kapitalgrundarlag, sum er ney›ugt, um t.d. ein n‡ggj verkætlan skal realiserast.

Harumframt vísur Petur Holm á, at krøvini til eitt virki, sum fer aktivt inn á markna›in, ver›a nógv størri enn tey eru hjá einum partafelagi› í dag.

Íleggjararnir hava eitt nu krav um at ver›a kunna›ir um ta›, sum fyriferst í virkinum. Eisini møguliga komandi íleggjarar, og tí eiga allar ætlanir virkisins at ver›a frábo›a›ar markna›inum, á›renn hesar ver›a førdar út í verk. Í nógvum virkjum er stø›an í dag annars solei›is, at sum minst ver›ur greitt frá, hvørjum ætlanum arbeitt ver›ur vi›.

Økt kappingarkrav

Harumframt kemur, at tá uttanh‡sis íleggjarar eru vi› í virkinum, ver›a har›ari krøv sett til kappingarføri hjá virkinum.

Petur vísir á, at í dag munnu nógvar lei›slur vera nøgdar, um virki stendur seg í kappingini, og møguliga eisini fær konsolidera› seg, so naka› ver›ur at standa ímóti vi›. N‡ggju íleggjararnir krevja tó eisini sítt, og tí ver›ur kravi› um inntjening størri, tí virki umframt á›ur galdandi krøv, eisini skal vinna pening inn til eigararnar.

Sum nevnt, so metir Petur, at ein hugbur›sbroyting er ney›ug, tá ella um vir›isbrævamarkna›urin ver›ur veruleiki.

Hann tykist tó sannførdur um, at fyrimunirnir og møguleikarnir í eini slíkari skipan eru so nógv størri enn teir vansar, sum hetta inniber, og at hetta upp á longir sikt ver›ur mennandi fyri føroyskt vinnulív.

Petur Holm, stjórin í Kaupthing Føroyar heldur stórar møguleikar vera í einum vir›isbrævamarkna›i, men vísur samstundis á, at hetta vi›førir n‡ggj krøv til virkini

Kunnandi fund um vir›isbrøv

Í gjár skipa›i TK-stovan fyri seminari um vir›isbrævamarkna›, sum arbeitt ver›uv vi› at skipa í Føroyum í løtuni

SVEINUR TRÓNDARSON

Áhugin fyri skei›num var sera stórur, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í TK-stovuni.

- Ta› hevur naka› vi› ta› at gera, at fólk vita ikki rættiliga hvat ta› er, at handla vi› vir›isbrøvum, tí ta› er eitt ókent fyribrigdi í Føroyum. Ta› er so eisini orsøkin til, at vit skipa›u fyri seminarinum, sigur hann.

Ikki færri enn seks ymiskir fyrilestrar vóru á skránni á seminarinum í gjár. Stjórin í Landsbankanum, Sigurd Poulsen, leg›i fyri vi› at grei›a gestunum frá um endamáli› vi› Vir›isbrævamarkna›i Føroya, um virksemi og um framtí›arútlitini.

Sí›ani fór Tryggvi Pálsson, nevndarforma›ur í Íslendska Partabrævamarkna›inum, á pallin at grei›a føroyingum frá íslendsku royndunum, vi› serligum atliti til fortreytirnar fyri skipanini av einum effektivum og álítandi markna›i.

Um nakar, so hava føroysku peningastovnarnir innlit í føroyskt vinnulív. Hetta brúkti stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen til at meta um feløg, sum kunnu fáa fyrimun av at lata seg skráseta á einum føroyskum vir›isbrævamarkna›i. Samstundis greiddi hann frá teimum krøvum, sum hesi feløg — og núverandi eigarar teirra — mugu vera fyrireika›i at ganga undir.

Ein annar — nokkso n‡ggjur — vi›leikari á føroyska fíggjarmarkna›inum er Framtaksgrunnurin. Hansara lutur kann á ein hátt samanberast vi› lutin hjá smærru íleggjarunum, vi› tí fráviki, at grunnurin situr vi› nógvum peningi. Í tí sambandi greiddi forma›urin í Framtaksgrunninum, Wilhelm Petersen frá ávirkanini i› ein vir›isbrævamarkna›ur hevur á framtaksgrunnar, sum gera íløgur í føroyska vinnu.

Vinnan sjálv var eisini umbo›a›. Anfinn Olsen, sum hevur stjóri í Framherji Sp/F greiddi frá t‡dningin um sum vir›isbrævamarkna›urin hevur fyri vakstrarmøguleikar í føroyskari vinnu. Harumframt metti hann eisini um hvønn t‡dning ta› fer at hava fyri fiskiloyvini at rei›arí lata seg skráseta á vir›isbrævamarkna›inum.

Seinasta fyrilesturin helt íslendingurin Bjarni Kristján Thorvar›arson. Hann er stjóri í fyritøkuni Talenta hf, sum m. a. ger íløgur í íslendska vinnu. Ta› hann tosa›i um var hugtaki› »business angels« og tann t‡dning hesi hava í n‡ggjum fyritøkum. Harumframt greiddi hann eisini frá teimum krøvum, sum professionellir íleggjarar hava til tær fyritøkur, sum teir gera íløgur í.

Tá hesin fyrilestur var li›ugur var tí› til spurningar og samandrátt av tí, sum var komi› fram.

NÝTT í 3-aranum

FÁ SKIL Á TÍÐINI

SKÚLA- OG ÍTRÓTTARTALVUR

Høvuðsur, hjáur og ringiklokkur
Hesi kunnu setast upp bæði innandura og uttandura. Ur og tíðtakaraskipanir til skúlar, fimleikahallir og ítróttarhallir.

Eisini hava vit eina meira framkomna skipan, sum verður stýrd við radio-signali ella GPS.

3-arin umboðar ur- og lása-skipanir hjá Dansk Tidskontrol. Vit hava nógvar loysnir uppá ymsar ur- og tíðarskipanir, sum hóska til fyritøkur, skúlar, ítróttarhallir og virkir í ymsum støddum. Kom inn til okkara og fá eitt prát við okkum um tín tørv.

3arin

SANSIR · TEL 355 355

SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo